Skapa eina tilveru

Ver við til at skapa eina góða tilveru fyri ung fólk við skerdum virkisevnum. Ung fólk við evnum, ið skulu mennast, fáa nú møguleika fyri at búgva saman, at ganga í skúla, at arbeiða og hava eina virkna frítíð. Dámar tær avbjóðingar, ert tú hjartagóð/ur og hevur hug at arbeiða longur enn frá 8 til 16, les meira her.

LEIÐARASTARV

Starvið sum leiðari av verkætlanini `skúlatilboð til ung við breki` í Runavíkar Kommunu verður lýst leyst til setanar sum skjótast.
Talan er um eitt avbjóðandi leiðarastarv í nýggjari verkætlan. Leiðarin skal saman við ráðgevandi skúlabólkinum, næmingum, foreldrum og Mentamálaráðnum samskipa skúla, arbeiði, bústað og frítíð í eitt skúlatilboð.
Talan er um eitt døgntilboð, har næmingarnir búgva á skúlanum, og arbeiðið skal tí skipast í vaktum. Leiðarin skal vera við til at seta starvsfólk, fyrireika innrætting av hølum og áseta innihaldið í tilboðnum.
Skúlaárið 2003/2004 verða 6 næmingar í aldrinum 20-25 ár í skúlanum.

Søkt verður eftir leiðara, sum
- undir ábyrgd Mentamálaráðsins skal hava fyrisitingarligu, fíggjarligu og námsfrøðiligu leiðsluna av verkætlanini.
- dámar væl at samstarva/samskifta við ung við breki og skipa tilveru teirra.
- dugir at samstarva við foreldur og er fyrikomandi.
- er kveikjandi í sínum skúlahugsanum og hevur hugsjónir um annarleiðis skúlamenning.
- er førur fyri at skilja støðuna hjá øðrum.

Harumframt skal leiðarin
- hava hug og hegni til at átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd.
- leggja dent á at fremja andsfrælsi, toleranse og gott samarbeiði millum skúla og heim.
- vera førur fyri at loysa trupulleikar.
- vera førur fyri at røkja og menna starvsfólkasamstarvið.
- skapa virðing fyri skúlatilboðnum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.
- eggja næmingum, foreldrum og starvsfólki til at leggja doyin á at fáa sum mest burtur úr skúlatilboðnum.

Førleikakrøv
Krøv eru ikki til ávísa útbúgving. Umsøkjari við handaligari, sosialari ella pedagogiskari ella líknandi útbúgving hevur fyrimun. Starvsroyndir frá arbeiði saman við ungum við breki hava týdning.

Lønar- og setanartreytir
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Starvið verður sett sum sáttmálasett 6 ára tíðaravmarkað starv. Um umsøkjari er í almennum starvi frammanundan vil Mentamálaráðið medvirka til, at tann, sum settur verður, fær avtalu um longt farloyvi í lag við arbeiðsgevara sín.

Umsóknir
Umsókn saman við møguligum avritum av próvskjølum og viðmælum skal vera Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi leygardagin 19. juli 2003.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kanst tú ringja til Poul Nolsøe, løgfrøðing, ella Janus Jensen, undirvísingarleiðara á telefon 355050.

Mentamálaráðið, Hoyvíksvegur 72, Postrúm 3279, 110 Tórshavn,
Telefon 355050, Fax 355055, e-postur: MMR@MMR.fo

Manja, Súsanna og Terji sluppu víðari

Tvey innleiðandi umfør í barna-prixnum vóru um vikuskiftið

BARNAPRIX
Tíðindaskriv

I vikuskiftinum vóru tvey innleiðandi umfør av Nósabarnaprix 2003.

Fyrra var í Roynhøllini í Hvalba har vinnarin bleiv Manja Johannsen. Annað umfarið varð hildið í Badmintonhøllini í Havn. Har var tað Súsanna Samró og Terji Højgaard, sum skulu við í stóru finaluna sum verður áÓlavsøku tann 28. juli í Badmintonhøllini.

Nú eru bert tvey innleiðandi umfør eftir, so spennandi verður, hvør fer avstað við heitinum og teimum tíggjutúsund krónunum, sum er høvuðsvinningurin. Nr. 2 og 3 fáa eisini vinning. Tað er Føroya banki sum stuðlar Nósabarnaprix 2003.

MÓTTØKA

verður hjá Pf. Poul Hansen á Hálsi fríggjadagin 4. juli frá kl. 16-18.

Jens Petur Egholm
hevur starvast hjá P/F Poul Hansen í
46 ár

Paula Hansen
hevur starvast hjá P/F Poul Hansen í
25 ár



Sigmund í Hoyvík
hevur starvast hjá P/F Poul Hansen í
47 ár

Í sambandi við at hesi 3 eru givin eftir langa og trúgva tænastu hjá P/F Poul Hansen heilsølu, hevði tað gleðt okkum at sæð viðskiftafólk, vinir og kenningar í hølunum hjá P/F Poul Hansen á Hálsi fríggjadagin 4. juli frá kl. 16.00-18.00.

Reyð tøl á komandi fíggjarlóg

Fyrstu tølini við fíggjarlógini fyri 2003 eru langt frá nøktandi. Tað viðgongur Óli Breckmann, formaður í Fíggjarnevndini hjá løgtinginum. Sum nú er, geva ynskini frá ymsu aðalráðunum eitt minus á góðar 200 milliónir krónur á komandi fíggjarlóg, áðrenn lønarhækkingar eru íroknaðar. Nú fáa ráðini boð um at skera niður

FÍGGJARLÓG
Ingi Rasmussen

Eftir tógvi stríð eydnaðist tað at fáa skorið fíggjarlógina niður í fjør. Líkt er til, at sama søgan kann endurtaka seg í ár, tí Óli Breckmann er alt annað enn nøgdur við arbeiðstølini til komandi fíggjarlóg, sum Karsten Hansen hevur fingið á borðið frá landsstýrismonnum

Samgongan er longu farin at viðgera tølini fyri løgtingsfíggjarlógina komandi ár.

Fíggjarlógin er so at siga karmurin um samfelagið. Í fíggjarlógini kemur ítøkiligi politikkurin til sjóndar, har virðini og byrðarnar verða býttar.

Í síðstu viku legði hvør landsstýrismaður síni tøl fyri Karsten Hansen, landsstýrismann við fíggjarmálum. Frammanundan hava landsstýrismenn fingið boðini, at fíggjarlógin fyri komandi ár skal vera eitt prosent lægri enn fíggjarlógin fyri 2002, men tað er so sum so, hvussu boðini eru aktað.

Í vikuni, sum fór, stungu landsstýrismenn og samgonguumboðini í fíggjarnevndini høvdini saman og kjakaðust um tølini, ið standa á ynskilistanum. Sambært álítandi upplýsingum, sum Sosialurin hevur fingið, vísti samanteljingin góðar 200 milliónir krónur í undirskoti á fíggjarlógini komandi ár. Verður almenna lønarhækkingin tann sama, sum vit higartil hava sæð, táttar undirskotið í einar 280 milliónir krónur.

Góðtekur ikki undirskot

Tølini eru langt frá tí, sum er sett sum mál. Nakrir landsstýrismenn hava fylgt boðunum um at lækka karmin eitt prosent, men serliga á trimum rakstrarstøðum var stórt minus. Tað eru almannamál, heilsumál og mentamál.

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjamálum, vil ikki út við nøkrum tølum enn, tí tað er so stutt fráliðið, og talan er bert um arbeiðstøl.

– Arbeiðið við fíggjarlógini gongur, sum tað skal, og eg kann siga, at vit eru longri frammi, enn vit vóru um somu tíð í fjør. Eg haldi ikki, at tíni tøl eru heilt røtt. Umleið helvtin av landsstýrismonnum hava fylgt mínum tilmæli, men sjálvandi eru nakrir, sum royna at fáa eitt sindur omaná. Tølunum fari eg ikki at viðgera alment so tíðliga, men vit fara ikki út við einari fíggjarlóg, sum gevur undirskot. So mikið kann eg siga, sigur Karsten Hansen.

Taka aftur um endan

Síðsta ár, tá samgongan smíðaði fíggjarlógina, varð endin, at fíggjarnevndin hjá løgtinginum tók um endan og skar einar 100 milliónir krónur av fíggjarlógaruppskotinum, sum landsstýrið hevði lagt fyri tingið.

Tað var fíggjarnevndini eitt hart hoyggj at draga, og boksast mátti í nógvar ættir, fyri at fáa kabaluna at ganga upp. Nú kann sama søgan endurtaka seg. Óli Breckmann, formaður í fíggjarnevndini, viðgongur, at enn er langt á mál at røkka málsetninginum, sum sigur, at fíggjarlógin skal minka við einum prosenti.

– Hetta er so eitt útgangsstøði, men tað er langt frá nóg gott. Nøkur málsøki eru komin upp á pláss, men onnur eru absolutt ikki nóg góð, um vit skulu røkka ætlanini at minka verandi fíggjarlóg við einum prosenti, sigur Óli Breckmann.

Fíggjarnevndarlimirnir hjá samgonguni hava longu nú givið landsstýrismonnum boð um, at málsetningurin skal haldast, og Óli Breckmann ger púra greitt, at vera tølini so reyð, sum tey nú síggja út, so átekur fíggjarnevndin sær aftur leiklutin sum barberurin, ið kutar burturav fíggjarlógini.

– Um menn ikki makka rætt, um vit síggja somu slendrian sum seinast, so mugu vit gera arbeiðið fyri teir. Men vit royna at fáa loyst trupulleikan áðrenn framløgudagin hesaferð, sigur Óli Breckmann.

Hótta við lønum

Sáttmálasamráðingarnar hjá Starvsmannafelagnum og øðrum feløgum fara at ávirka tølini á fíggjarlógini í stóran mun. Fáa tey alment settu somu lønarhækking í prosentum sum tey á privata arbeiðsmarknaðinum, fer tað at kosta einar 70 milliónir krónur.

Tað kann koppa alla ætlanina við tí eina prosentinum, men tann trupulleikan hevur Fólkaflokkurin eitt greitt boð uppá.

– Mítt uppskot er, at vit lata vera við at geva lønarendurgjald fyri tær lønarhækkingar, sum koma. Vit kundu givið tey greiðu boðini, at um Starvsmannafelagið vil hava stóra lønarhækkingar, mugu tey sjálv taka avleiðingarnar fyri teirra limir undir hvørjum einstøkum aðalráði. Tað kundi verið ein gongd leið fyri at sleppa undan reyðum tølum, sigur Óli Breckmann, sum kortini ger vart við, at tað er hansara sjónarmið.

Hvussu verður og ikki, so er greitt, at fíggjarlógin fyri komandi ár longu nú gevur høvi til kjak innanhýsis í samgonguni.

Rætting

Í greinini um nýggju stjórnmálafrøðingarnar leygardagin komu vit av misgáum at nevna ein teirra Oyvind Brimnes. Tað var ikki rætt, tí nýggi stjórnmálafrøðingurin eitur Oyvindur av Skarði, sum tað eisini stóð aðrastaðni í greinini. Vit umbera.

Setrið ósamt í niðurstøðu

Ætlanin var ongantíð at skerja framsøgufrælsið hjá Jógvani Mørkøre, sigur setursráðið, sum er ósamt við Mentamálaráðið. Kortini tekur setursráðið niðurstøðuna til eftirtektar og hevur ógildað ávaringina, sum Jógvan Mørkøre fekk fyri útsagnir í Sosialinum

TALUFRÆLSI
Ingi Rasmussen

Setursráðið á Fróðskaparsetrinum hevur nú viðgjørt avgerðina hjá Mentamálaráðnum, sum hevur viðgjørt kæruna frá Jógvani Mørkøre, adjunkti á Søgu- og samfelagsdeildini.

Jógvan Mørkøre fekk eina skrivliga ávaring frá rektaranum, tí hann úttalaði seg kritiskt í Sosialinum um arbeiði í sonevndu Menas-frágreiðingini, ið Setrið legði navn til.

Mentamálaráðið kom til ta niðurstøðu í málinum, at framsøgufrælsið hjá Jógvani Mørkøre varð skert í óneyðugan mun, tá hann fekk ávaringina.

Setursráðið sigur seg taka niðurstøðuna til eftirtektar, hevur ógildað ávaringina og metir málið endað. Men samstundis sigur ovasta leiðslan á Setrinum, at hon ikki er samd við Mentamálaráðið.

»Tað hevur ongantíð verið ætlanin at forða medarbeiðarum í at siga sína hugsan alment um hetta málið, ei heldur um onnur mál. Tað, sum álagt varð medarbeiðaranum, var í síni umrøðu av samstarvsfólki hjá Setursráðnum at sýna høviskan málburð«, skrivar Setursráðið í einum tíðindaskrivi.

Í Setursráðnum sita Malan Marnersdótti, rektari, Jóan Pauli Joensen, Hans Pauli Joensen og Turið Sigurðardóttir.